

Mynd: Álvur Haraldsen

# Klaksvíkingar orkaðu ikki meira

**HONDBÓLTUR** KÍF fekk ein hvøkk, tá teir vitjaðu í Klaksvík. Orkan hjá heimaliðnum gekk undan seinastu løtuna, og fóru kollfirðingar undan klaksvíkingum

Uni Holm Johannesen

Fortreytirnar hjá Team Klaksvík vóru ikki tær bestu.

Pole J. Hansen situr ikki longur í venjarastarvinum, og Damir Oros hevur tikið við avbjóðingini sum hjálparvenjari hjá Tjaldrinum.

Tórður Lervig, sum hevur staðið seg væl seinastu dystirnar, var burturstaddur, Kristoffur Jacobsen og Bent Hansen sótu uttanfyri við skaða.

Hinvegin var tað okkurt sum bendi á, at tað var ein fyrimunur hjá Team Klaksvík.

Uppflytararnir spældu sín besta dyst á árinum, tá kollfirðingar vitjaðu leygardagin.

KÍF var við yvirlutan allatíðina, men kollfirðingarnir staðfestu ongantíð, at teir fóru at vinna. Team Klaksvík stríddist væl, og munurin var sjáldan størri enn fýra mál.

Men so gekk orkan undan hjá uppflytarunum.

Avrikini vóru lítið sannførandi í verjupartinum, og kollfirðingar spældu seg einfalt til møguleikarnar.

Tá runnu kollfirðingarnir undan og vunnu tryggan sigur. Endaliga úrslitið var 37-24.

## ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN:

### **H71 – Neistin** 33-42 (15-22)

Dómarar: Rúni Mohr og Ragnar Simonsen

**10 min.: 4-7**
**20 min.: 10-13**
**40 min.: 18-30**
**50 min.: 26-35**

**H71:** Bogi Krossteig 5, Ári J. Olsen 4, Poul Kjartan Dam 4, Tróndur Vatnhamar 4, Sigmund Dahl 4, Rúni V. Højgaard 4, Esbern Patursson 3, Bogdan Florea 3, Bogi G. Davidsen 1, Rógvi Sørensen 1.
**Neistin:** David Edvardsen 12, Heini Hanusarson 9, Finnur Hansson 7, Jugoslav Djumic 5, Sjúrður Thomassen 4, Ingi Olsen 2, Áki Mørk 2, Jákup Apol 1.
Útvísingar: H71 6 – Neistin 5
Áskoðarar: 200

### **Kyndil – VÍF** 20-20 (7-10)

Dómarar: Heri Petersen og Dánjal Samuelsen

**10 min.: 3-4**
**20 min.: 4-7**
**40 min.: 10-15**
**50 min.: 13-18**

**Kyndil:** Hans Áki Dal-Christiansen 6, Bárður Johannesen 5, Josef Abrahamsen 2, Rúni Johansen 2, Rani Ellingsgaard 2, Høgni Klein-Olsen 2, Hans Arni B. Thomsen 1.
**VÍF:** Sámal Joensen 4, Magnus á Rógvi 3, Magnus Muller 3, Jákup Andreasen 2, Joen P. Høgnesen 2, Sámal Jákup Djurhuus 2, Bjarti Hansen 2, Áki G. Olsen 2.
Útvísingar: Kyndil 3 – VÍF 4
Áskoðarar: 165

***Tað eyðnaðist tíverri ikki at fáa dómaraseðilin frá dystinum millum Team Klaksvík og KÍF***

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 8 | 281 | 210 | 71 | 15 |
| 2 | KÍF | 8 | 240 | 199 | 41 | 13 |
| 3 | H71 | 7 | 196 | 193 | 3 | 8 |
| 4 | Kyndil | 8 | 202 | 204 | -2 | 8 |
| 5 | VÍF | 8 | 202 | 200 | 2 | 6 |
| 6 | StÍF | 7 | 158 | 165 | -7 | 4 |
| 7 | Team Klaksvík | 8 | 180 | 288 | -108 | 0 |

# Kyndil stríddist til tað síðsta

**HONDBÓLTUR** Tá Josef Abrahamsen sendi bóltin framvið Eli Muller í seinasta minuttin, setti hann somuleiðis punktum fyri einum flottum comeback hjá Kyndli

*Sámal Joensen (2), var við fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum*



Mynd: Álvur Haraldsen

Uni Holm Johannesen

Tá sá einki út hjá Kyndli.

VÍF var á odda 20-14, tá sjey minuttir restaðu í av dystinum. Vestmenningar høvdu beina kós móti einum sigri.

Men »so brádliga fleyg fjandin í okkara menn,« skrivar heimasíðan hjá Kyndli.

Grønlittu havnarmenninir vunnu seg upp á javnleik.

### VÍF iðraði seg

Tað kemur sera illa við hjá vestmenningum, at teir ikki fingu fult í gjár.

VÍF hevur traðka við síðurnar av fleiri ferðir í hesum kappingarárinum. Tað hevur við sær, at vestmenningar hava mist sambandið við ovastu liðini.

### Spældi í sjey minuttir

Tað var annars lítið veiggj í Kyndli í gjár.

Avrikið var lítið sannførandi í fyrra hálvleiki. Heimaliðið hevði lítið hugflog í álopsspælinum, og gestirnir sluppu ov ofta til upplagdar møguleikar framman fyri málinum hjá Kyndla-málverjunum.

VÍF fekk seinastu royndina í dystinum, aftaná, at Josef Abrahamsen hevði javnað til 20-20.

Skotið brast í stólpan, og so kundi heimaliðið lata seg fagna av sínum áskoðarum.

# Neistin setir sær onnur mál

**HONDBÓLTUR** Tað ræður ikki bara um at vinna. Neistin setir sær fleiri mál, sigur Sjúrður Thomassen, aftaná, at greipuvinnararnir staðfestu, at tað er framvegis langt eftir á mál hjá hoyvíkingum, um teir skulu vinna sær pláss í finaluni

Uni Holm Johannesen

– Vit eru ikki bara nøgdir við at vinna. Vit vilja altíð vera sannførandi í verjupartinum, og vit royna eisini nýggj mynstur í verjupartinum og álopsspælinum. Tað ræður ikki bara um at vinna, men eisini, hvussu vit vinna.

Tað sigur Sjúrður Thomassen. Hann og Neistin hava verið einaráðandi í hesum kappingarárinum.

Aftur í vikuskiftinum prógvaðu greipuvinnararnir, at eingin stendur teimum kurl.

### Ungir hoyvíkingar

Seks minuttir vístu seg at verða avgerandi.

Stóru og reyðu tølini á talvuni í Hoyvíkshøllini vístu 24 minuttir. Úrslitið var 15-15.

Men so var galið hjá hoyvíkingum.

Neistin setti ferðina upp og skeyt sjey mál upp í slag. Hálvleiksstøðan var 22-15 til gestirnar. Tá mistu hoyvíkingar somuleiðis sambandið við finaluplássini fyribils.

– H71 royndi at hótta í seinna hálvleiki, og teir vunnið eisini fleiri mál aftur. Tíbetur fingu vit aftur ferð á, sigur Sjúrður Thomassen.

Daniel Rapa og Petur Mittún hava ábyrgdina av einum ungum liði.

Bogi Krossteig, Rúni V. Højgaard, Ári J. Olsen og Sigmundur Dahl eru millum teirra, sum ikki hava verið drúgvir í bestu deildini, men venjararnir hava víst teimum álit, og teir hava eisini staðið seg væl.

Leygardagin vóru teir mest eyðsýndir hjá H71. Hóast tað als ikki var nóg mikið móti Neistanum um, so boðar tað frá góðum í framtíðini, um teirra menning stendur við.

### Gjørdu skjótt av

Tað var serliga í álopsspælinum, at tað var lítið veiggj í hoyvíkingunum. Heimaliðið gjørdi stundum ov skjótt av, og Neistin revsaði teimum so dyggiliga fyri mistøkini.

Serliga tóku gestirnir av, tá teir fóru í skjótálop. David Edvardsen gekk oftast á odda.

Neistin fekk heili 42 mál. Undan steðginum spældu gestirnir væl og sluppu til fleiri upplagdar málmøguleikar. Tað merkist hinvegin í seinna hálvleiki, at munurin var stórur millum liðini, og Neistin tók sær av løttum.

### Klassamunur

Neistin hevur væl og virðiliga prógvað í hesum kappingarárinum, at tað er klassamunur á greipuvinnarunum og hinum liðunum.

Tað er bara í grannauppgerðini móti Kyndli, at Neistin hevur mist stig. Tá var úrslitið 28-28.

– Tað er sjálvandi stuttligt at vinna, men tað er ikki altíð lætt at vera motiveraður. Tað eru dystirnir móti StÍF og Kyndli bestu dømini um. Men vit seta okkum onnur mál enn bara at vinna dystirnar, og vit vilja røkka teimum málunum eisini, sigur Sjúrður Thomassen.

Spurningurin er í løtuni, hvør skal bjóðað greipuvinnarunum av í finalunum um føroyameistaraheitið.

*uni@sosialurin.fo*